## Leki í Norðoyatunlinum

Leki er á lensirørunum í tunlinum, men eingin vandi er á ferð. Tað staðfestir stjórin í Norðoyatunlinum, Uni Danielsen, fyri Norðlýsinum. Blaðið skrivar, at menn fyrr í kvøld vórðu varugir við, at meira vatn enn neyðugt mátti pumpast úr tunlinum. - Lekin, sum í kvøld er staðfestur, er ikki størri enn so, at nøktandi av lensivatni rennur úr Norðoyatunlinum og út á sjógv í Leirvíkfirði. Tað vil siga, at vit halda væl lens, hóast vit fáa ov nógv oman aftur í brunnin. Fyribils fer hetta ikki at órógva ferðsluna. Men sjálvandi, tá vit fara at grava niður á lekan, so verður ferðslan tarnað nakað, sigur Uni Danielsen við Norðlýsið.

## "Open Mic" kvøld á Margarinfabrikkini

Fríggjakvøldið 11.04 verður Singer/Songwriter og "Open Mic" kvøld í Margarinfabrikkini, har tey sum fara at framføra verða Knút Háberg Eysturstein, Sigrið Rasmussen og Katrina Petersen. Tey framføra egin løg og verður síðan eisini "Open Mic" har øll hava møguleika at framføra eitt lag , lesa eina yrking upp, ella okkurt heilt annað. Hetta er triðju ferð skipað verður fyri hesum tiltakinum og er endamálið, at skapa ein føroyskan tónleikapall fyri singer/songwriter tónleikarar, har teir hava møguleika, at framføra egin løg, í hugnaligum og avslappandi umstøðum, við lurtandi áhoyrarum. Tiltakið byrjar kl 21 og er ókeypis atgongd og øll eru hjartaliga vælkomin.

# Sjálvstýrisflokkurin skipaður á aðalfundi



*Í landsnevnd Sjálvstýrisfloksins eru, f.v.: Kári á Rógvi, løgtingsmaður, Kristina Toftegaard Larsen, Eileen Sandá, Jákup Sverri Kass, Heðin D. Poulsen, Karl Olsen, Jan Joensen og Kári P. Højgaard, løgtingsmaður*

*Mynd: Sjálvstýrisflokkurin*

**Á aðalfundi leygardagin skipaði Sjálvstýrisflokkurin seg við formanni og næstformanni á tingi, eins og við starvs-og landsnevnd**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin 5. apríl helt Sjálvstýrisflokkurin aðalfund og landsfund í Pálsstovu í Havn.

Aðalfundurin byrjaði klokkan 10 og varð liðugur um middagin.

Síðan byrjaði landsfundurin beint eftir matarsteðgin eftir middagsleiti, og klokkan 17 seinnapartin varð landsfundurin lokin.

Aðalfundurin valdi Petur Olivar í Hoyvík, vanliga róptur Gimpi, til fundarstjóra og Rúnu Sivertsen, skrivara Sjálvstýrisfloksins, til fundarskrivara.

Tað var Jan Joensen, næstformaður í landsnevndini, sum setti aðalfundin.

Longu, tá ið aðalfundurin byrjaði, skjeyt fundarstjórin upp at seta ein trímannabólk at skriva fundarsamtykt, og í henda bólk vórðu vald Kári á Rógvi, Kristina Toftegaard og Jan Joensen.

Á aðalfundinum varð roknskapurin góðkendur, eins og Jóannis Skorheim varð afturvaldur til grannskoðara.

### Kári P formaður

Kári á Rógvi, tingmaður, skjeyt upp at velja Kára P. Højgaard til formann Sjálvstýrisfloksins á tingi. Hetta uppskot varð einmælt samtykt og heldur Kári soleiðis fram sum formaður. Kári á Rógvi varð valdur næstformaður floksins á tingi.

Í landsnevndina vórðu vald Karl A. Olsen, Heðin D. Poulsen, Kristina Toftegaard Larsen, Jan Joensen, Jákup Sverri Kass og Eileen Sandá.

Landsnevndin kann velja tveir limir aftrat, ein úr Vágum og ein úr Sandoynni.

Á aðalfundinum varð starvsnevndin mannað við Petur Olivari í Hoyvík og Jákupi Sverra Kass. Landsnevndin velir tríggjar limir aftrat í starvsnevndina.

### Konstruktivt orðaskifti

Einki ávíst mál var á skránni til sjálvan aðalfundin, men kortini nýttu fleiri høvi at taka orðið.

Orðaskifti var positivt og konstruktivt, verður sagt frá fundinum.

Sjálvur aðalfundur Sjálvstýrisfloksins var lokin um middagin. Eftir fundarlok var matarsteðgur, og eftir steðgin varð sjálvur landsfundurin settur.

Eini 28 fólk vóru á aðalfundi floksins.

# Tørvur er á bindandi lógum

**- ST-sáttmálin er týdningarmesta skjalið, sum fólk við breki nakrantíð hava havt. Umráðandi er, at sáttmálin verður samtyktur, raðfestur og fylgdur í Føroyum, segði Laila Solmunde, formaður í Meginfelag teirra Brekaðu, á landsfundi**

GESTARØÐARI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í fyrilestri sínum, sum gestarøðari á landsfundi Sjálvstýrisfloksins, vísti Laila Solmunde á, hvussu umráðandi tað er, at ST-sáttmálin um rættindi teirra brekaðu verður samtyktur í Føroyum – og at hesin eisini verður raðfestur og fylgdur.

### Bindandi lógir

- Men tað er ikki nóg mikið við einum mannarættindasáttmála. Okkum tørvar ein sáttmála, sum heilt greitt tilskilar, hvat tað er, sum skal til hjá fólki við breki fyri, at hesi kunnu verða á jøvnum føti við aðrar borgarar landsins.

Hon segði, at neyðugt er við bindandi lógum, sum ikki slepst undan at halda.

- Fólk við breki hava altíð skula dúva upp á tann góða viljan hjá myndugleikunum, og neyðugt hevur verið at bíða eftir, at stig vórðu tikin.

Laila vísti á, at við 25 árum á baki sum meginfelag er greitt, at neyðugt er við lógum, um fólk við breki skulu fáa neyðugar sømdir í samfelagnum.

### Sjálvstøðug rættindi

- Við ST-sáttmálanum sleppa vit undan at skula tigga og biðja, men fáa sjálvsøgd rættindi, eins og onnur hava tað í gerandisdegnum, segði forkvinnan í Meginfelag teirra Brekaðu.



*Laila Solmunde, formaður í Meginfelag teirra Brekaðu, var gestarøðari á landsfundi Sjálvstýrisfloksins*

*Mynd: Sjálvstýrisflokkurin*

Laila Solmunde segði, at ST-sáttmálin er tað týdningarmesta skjalið, sum fólk við breki nakrantíð hava havt.

- Men nú er so eftir, at fáa sáttmálan staðfestan í Føroyum, legði hon aftrat.

### Nýggj landsbyggilóg

Ein av teimum, sum tók orðið eftir framløguna hjá Leilu Solmunde, var Kristina Larsen.

Hon vísti á, at umstøðurnar hjá rørslutarnaðum als ikki eru nøktandi í samfelagnum.

- Sjálvt um vit ferð eftir ferð hoyra, at umstøðurnar skulu betrast, hendir alt ov lítið

Kristina spurdi tí, um tað kanska hevði verið eitt hugskot at fingið eina nýggja landsbyggilóg, sum eitt nú ásetir krøv um atkomuviðurskiftini til nýbygging.

- Vit eiga at lóggeva á hesum øki á ein hátt, sum bæði fevnir um tað almenna og privata, segði Kristina Larsen.